# Kjak



**Bergtóra Høgnadóttir Joensen**
*tingkvinna, tjóðveldi*

## Arbeiðsmarknaðardepil – púra samd

Gleddi meg at hoyra Maritu Rasmussen siga – í Degi og Viku 12. juli '10 - at partarnir á arbeiðsmarknaðinum kundu hugsað sær ein arbeiðsmarknaðardepil. Hon nevndi, at tað hevði skapt synergi effekt, umframt at lógarverk og umsiting høvdu havt gagn av hesum. Taki fult undir við hesum sjónarmiðum.

### Eitt arbeiðsmarknaðargjald

Í verandi løtu rinda vit til ALS og í barsilsgrunn. Kundi hugsað mær, at vit ístaðin rindaðu eitt sonevnt arbeiðsmarknaðargjald. Arbeiðsmarknaðargjaldið bleiv nýtt til ymiskt, sum hevði við arbeiðsmarknaðarviðurskifti at gera. Arbeiðsmarknaðardepilin umsat og virkaði fyri hesum. Nevnast kann: ALS, barsilsskipan, eftirútbúgving og ikki minst ein arbeiðsmarknaður, sum tók sosiala ábyrgd.

### Sosial ábyrgd

Sosial ábyrgd á arbeiðsmarknaðinum snýr seg um, at arbeiðspláss gera sítt fyri at fyribyrgja, at starvsfólk gerast sjúk og niðurslitin. Arbeiðsplássini skulu kenna seg 'ílatin til' og raðfesta, at starvsfólk kunnu verða verandi á arbeiðsmarknaðinum, tá tey gerast sjúk, men hava varðveitt ein part av arbeiðsførleikanum. Harumframt er alneyðugt, at arbeiðsmarknaðurin í størri mun kann rúma teimum, sum standa uttanfyri arbeiðsmarknaðin.

Mong arbeiðspláss gera veruliga ein hóp fyri síni starvsfólk og fleiri eru eisini 'við uppá' at geva fólki við skerdum førleika ein møguleika. Royndir vísa tó, at tað mangan eru tey, sum eru sjúk ella hava skerdan førleika á einhvønn hátt, sum fyrst fáa fótin, tá sparast skal.

Í ár var talið á umsóknum til Dugniskúlan við Áir methøgt. Helmingurin fekk einki pláss. Sum er, er hesin skúlin einasta skúlatilboð til teirra sum hava hava skerdan førleika onkursvegna.

### Almenna á odda

Lógarkarminum tørvar avgjørt ábøtur til tess at bøta um arbeiðsmøguleikarnar hjá teimum við skerdum førleika. Men skulu vit gera okkum vónir um, at sosiala ábyrgdin gerst størri, eigur tað almenna at ganga á odda og vera ein fyrimynd. Hví ikki hava beinleiðis orðingar um, at ávísur prosentpartur av arbeiðsmegini hjá tí almenna skal vera til fólk við serligum tørvi?

Mær er sagt, at eitt slíkt uppskot til samtyktar var samtykt á Føroya Løgtingi í 80-árunum. Fleiri almenn arbeiðspláss taka sosial ábyrgd og privat arbeiðspláss við. Men langt er enn á mál um vit veruliga kunnu tosa um ein arbeiðsmarkna fyri øll.

### Tey ungu

Avbjóðingin hjá teim ungu at finna sær starv er stór, tá arbeiðsloysið er. Tey hava onga útbúgving og fáar um nakrar arbeiðsroyndir at vísa á. Veit, at bæði ALS og Almannastovan royna at bøta um støðu teirra, men her kundi ein arbeiðsmarknaðardepil gjørt mun.

### Javnvágin millum familju og arbeiðið

Arbeiðsmarknaðardepilin kundi eisini skapt betri karmar og varpa ljós á aðrar avbjóðingar sum eru. Avbjóðingin hjá smábarnafamiljum at finna javnvágina millum familju og arbeiðslív – ikki minst í verandi løtu, tá tað kanska er serliga trupult hjá foreldrum, tí tey eisini eru bangin fyri at missa starv sítt. Ivist ikki í at tað ger avbjóðingina enn størri.

### Gráa gullið

Ætlanin er, at fólk skulu eggjast til at vera á arbeiðsmarknaðinum sum longst. Sjálvsagt eiga vit at gera tað attraktivt hjá teimum eldru at vera á arbeiðsmarknaðinum. Kanska serligar uppgávur? Frítakast fyri ávísar uppgávur? Sonevndar seniorsamrøður og evnisdagar á arbeiðsplássinum?

### Einasta rætta í Føroyum

Ein veruligur arbeiðsmarknaðardepil var eisini ein vitanardepil um arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Umboðaður av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, sosialu skipanunum, ALS, barsilsskipan, eftir/útbúgvingardepil. Eisini hevði hesin tætt samstarv við ráðini í politisku skipanini, so neyðugar lógartillagingar og góð hugskot skjótt gjørdust veruleiki. Um peningur eisini var til gransking á føroyska arbeiðsmarknaðinum og skilagóðar verkætlanir sum skaptu trivna var tað eisini bara enn eitt pluss.

Vænti avgjørt, at arbeiðsmarknaðurin fyri øll nógv lættari gjørdist veruleiki við einum veruligum arbeiðsmarknaðardepli. Júst í Føroyum átti at veri so einfalt at fari í holt við ein slíkan. Samanumtikið er at vóna, at vit heldur savna skipanir í einum depili heldur enn at spjaða. Vóni at vit, virðing og skil verður tikið fram um egináhugamál hjá ávísum politikarum.

**Majbritt Mohr,**
*forkvinna í Almanna- og heilsurøktarafelagnum*

## Fyrilitaleysar sparingar loysa seg ikki

Sparingar verða í løtuni framdar á nærum øllum ellis- og røktarheimum og sambýlum kring landið. Tíverri velja flestu stovnar, at tað skal ganga út yvir arbeiðstíðina hjá røktarstarvsfólkunum. Røktarstarvsfólk, ið altíð hava arbeitt 8 tímar dagliga, skulu nú arbeiða millum 5 og 7 tímar ístaðin.

Flestu limirnir í Almanna- og heilsurøktarafelagnum arbeiða niðursetta tíð. Fleiri teirra ynskja hetta, tí arbeiðið er likamliga og sálarliga strævið, men eisini nøkur, tí tey ikki sleppa at arbeiða fulla tíð.

Á fleiri stovnum sleppa røktarstarvsfólk, sum nevnt, ikki at arbeiða fulla tíð. Men fyri stovnin í sjálvum sær loysir tað seg jú, at starvsfólkið arbeiðir niðursetta tíð. Tá eru fleiri fólk at taka av, tá ið á stendur, og tørvur er á tímaløntum fólki. Ónøgdin hjá teimum, sum ynskja ella tørva meiri arbeiði og pening hvønn mánað, er sjálvandi stór, tí tey hvønn dag mugu liggja framvið at fáa óætlaðar eykavaktir.

Røktarstarvsfólk, sum arbeiða niðursetta tíð, og tí hava havt onkran eyka frídag um vikuna at hvíla seg, mugu nú, ið tey skulu arbeiða færri timar hvønn dagin, arbeiða fleiri dagar enn áður um vikuna. Hetta er snøgt sagt neyðugt, skulu tey fáa tímarnar, ið svara til setanarbrøkin.

Hetta kann hava við sær, at sjúkufráveran økist, tí røktarstarvsfólkið ikki fær neyðugu hvíldina. Tá ið sjúkufrávera er á stovnunum, verða, sum er, eingi eykafólk kallað inn. Hetta merkir, at færri fólk noyðast at gera alt arbeiðið á stovninum. Almanna- og heilsurøktarafelagið ávarar staðiliga ímóti hesi vandamiklu gongd. Hetta elvir til strongd og ótryggleika, og tað gagnar als ikki samfelagnum á nakran hátt.

Sum kunnugt gjørdi Nærverkið í fjør eina kanning um starvsfólkatørv í Nærverkinum fram til 2015. Kanningin vísir greitt, at starvsfólkatørvurin økist, tí fólk gerast alsamt eldri, og tí vit liva longur. So statt er tað sera týdningarmikið, at stovnarnir veruliga hugsa um, hvussu meint fyrilitaleysar sparingar kunnu raka starvsfólkini.

## Liberal leiðsla



**Heðin D. Poulsen, Kristina Toftegaard Larsen, Karl A. Olsen og Kári á Rógvi**
*valevni Sjálvstýrisfloksins*

Føroyar eru millum mest almennu búskapir í heiminum. Landsstýrið avlagar privatu vinnuna við at lata almennar stovnar átaka sær alt ov nógv, við studningi og reglum, við at gita og siga seg vita betur enn vinna og marknaður. Sjálvstýrisflokkurin heldur, at vit í staðin skulu velja liberala leiðslu.

Liberal leiðsla hevði borðið í sær, at landsstýrisfólk ikki hevði havt ferðaskrivstovu inni í aðalráði sínum. Hvør veit, hvørji átøk eru verd at fremja, hvørjar messur verdar at fara til? Svarið er: ferðavinnan! Politiska leiðslan skal ikki gita, hvat loysir seg í ferðavinnuni. Landsstýrið skal heilt einfalt 'matcha tað privata' – innan ávísan karm, skulu vit lata privatum pengar at marknaðarføra ferðavinnuna. Vilja tit brúka eina krónu, fáa tit eina almenna krónu afturat. Satsa tit tykkara pengar, satsa vit okkara – men tit skulu liva av hesum, so tit mugu velja, hvat loysir seg.

Liberal leiðsla er á sama hátt at lata teir mongu hugaðu sjálvsognarstovnarnar og tey mongu áhugafeløgini í landinum sleppa at fremja trivnaðar, mentanar og útbúgvingaruppgávur. Góður sosial-liberalur politikkur er, at landið skal gjalda fyri at geva øllum førleikar og hvøi og neyðuga røkt. Men landið skal ikki niður í smálutir at stýra væl virkandi stovnum. Tvørturímóti skulu fleiri stovnar loysast frá miðfyrisitingini. Landsstýrifólk og embætisverk skulu hugsa strategi og fremja neyðugt eftirlit, men ikki virka sum dagligur yvirstýrandi myndugleiki í stórum og smáum.

Vit eru sannførd um, at neyðugt er við reformun á so mongum økjum, harímillum í almenna landsbygnaðinum. Vit vilja fremja liberala leiðslu, tá ið vit verða vald.